# Leiðslusamskipari til Føroya Shell

Sjónband 317774

Vit sóknast eftir starvsfelaga til eitt spennandi og fjølbroytt starv. Leiðslusamskiparin vísir beinleiðis til stjóran, og skal í høvuðsheitum taka sær av fylgjandi:

**Marknaðarføring**
Tú hjálpir sølu- og marknaðarleiðaranum at samskipa og avgreiða øll marknaðarføringsátøk felagsins. Tú hevur ábyrgd av okkara miðlaætlan, tú samskipar samstarvið við uttanhýsis veitarar og tryggjar, at øll raðfest marknaðarføringsátøk verða avgreidd sum ætlað.

**Rakstur**
Tú hjálpir rakstrarleiðaranum við samskipan og avgreiðslu av ymsum rakstrar- og fyrisitingarligum uppgávum. Samstundis hevur tú ábyrgdina av skeiðskalendaranum fyri øll 110 starvsfólkini hjá Føroya Shell.

**Umsiting**
Leiðslusamskiparin er eisini stjórnarskrivari hjá Shell, so tú hjálpir stjóranum og umsitigardeildini við samskipan og avgreiðslu av ymsum umsitingarligum uppgávum. Hetta kann t.d. vera prísbroytingar og prísútrokningar, dagføring av heimasíðu, innsavnan og tilrættalegging av tilfari til nevndina hjá Shell. Tú er skrivari á leiðslufundum, og hevur annars annað vanligt umsitingararbeiði um hendi.

**Vit bjóða:**
Eitt spennandi og fjølbroytt starv í eini fyritøku, har nógvar spennandi broytingar henda í løtuni. Vit geva rætta persóninum góðar arbeiðstreytir, kappingarføra løn við eftirløn og førleikamennandi skeið. Tú fært møguleikan at tilrættaleggja starvið, arbeiðsdag og arbeiðstíð, so tað passar tær best – sjálvandi í samráð við stjóran. Starvið er eitt fulltíðarstarv, men um tú ynskir niðursetta arbeiðstíð, er eisini møguleiki til tess.

**Vit ynskja:**
Ein starvsfelaga við góðum yvirliti og góðum evnum innan samskipan, og vit vænta at tú trívist við støðugum avbjóðingum. Tú dugir væl við fólki, og tú hevur eitt lætt og fyrikomandi lyndi. Tú dugir væl at samskifta á bæði føroyskum og enskum, og hevur tú eina hóskandi útbúgving og royndir innan samskipan, er tað ein fyrimunur.

**Umsóknin**
skal sendast til Føroya Shell, Vestara Bryggja 10, FO 110 Tórshavn, innan 24 januar kl 10.00. Vilt tú vita meira um starvið, ert tú vælkomin at seta teg í samband við Hendrik Egholm, stjóra, á telefon 347410/215939, ella á hendrik@shell.fo. Tú byrjar so skjótt tilber, tó ikki seinni enn 1. mars 2008

www.shell.fo

POLITI




## POLITIIÐ SØKIR EFTIR POLITISTAEVNUM!

Politiið er eitt av størstu arbeiðsplássunum í Føroyum. Talan er um sjálvstøðug størv við nógvum avbjóðingum. Høvuðsuppgávan hjá løgregluni er í stuttum:

- at vera sjónlig og skapa tryggleika,
- at fyribyrgja ósemjur og ófrið
- at kanna og uppklára
- at upplýsa og gera fyribyrgjandi arbeiði

Grundarlagið fyri løgregluarbeiðnum er virðingin fhri rættartrygdini. Atlitið til borgaran og samfelagið er altíð í miðdeplinum.

Lønin er kappingarfør frá fyrsta degi. Royndartíðin er trý ár, eftir tað fært tú fast starv. Møguleiki er fyri rúgvu av serskeiðum og trygdin í starvinum er góð. Møguleiki er eisini at flyta millum deildir og arbeiða ymsastaðni í landinum.

Eingi krøv eru um formliga útbúgving ella lívsroyndir. Men tú skalt hava fyritreytir fyri at loysa álagdar uppgávur í samsvari við reglur og virði í samfelagnum og við virðing fyri tí einstaka og rættindum hansara. Vit ynskja eisini eitt hóskiligt býti millum kvinnur og menn.

Tú skalt hava fylt 21 ár, hava føroyskan/danskan heimarætt, hava góða heilsu, vanliga hoyrn og vanliga litsjón, og eisini skalt tú hava koyrikort til presónbil.

Umsóknarfreist til upptøkuroyndirnar í vár, er sett til 20. januar 2008.

www.politi.fo
www.politi.dk
www.blivpolitibetjent.dk

VIKUBLAÐIÐ

**FØROYA LANDFÚTI**
**Jónas Broncksgøta 17 · Postboks 3018 · 110 Tórshavn · tel 35 14 48**

# Ikki bara snakk!

*Tá ið eg bleiv landsstýrismaður fyri 4 árum síðani, fekk eg sum uppgávu at útinna tað, ið samgongan hevði niðurfelt í samgonguskjalið á skúla- og mentanarøkinum.*



## Lestrarstuðulin!

Vit settu okkum fyri at endurskoða lestrarstuðulin til forsyrgjarar og at virka fyri, at útbúgvingarmøguleikarnir hjá føroyskum lesandi úti í heimi vórðu støðugt mentir.
Og hetta bleiv sanniliga gjørt!

- Barnsburðarstuðul fyri lesandi settur í verk
- Lesandi við børnum fáa nú 600 kr. meira í studningi um mánaðin fyri hvørt barnið, tey eiga undir 18 ár
- Málskúlastuðul uttan fyri tann ensktalandi heimin settur í verk
- Fulltíðarlesandi uttanlands, búsitandi í Føroyum, kunnu nú fáa ferðarstuðul
- Rentan á lestrarlánum í lestrartíðini hálverað úr 4% til 2%
- Vistarhaldsstuðulin munandi hækkaður

Tað størsta framtakið, sum er hent á hesum øki, er, at skúlagjaldið fyri lesandi er lækkað munandi í øllum Stórabretlandi, har umleið 125 føroyingar lesa í dag. Hetta kemur helst at hava við sær, at 3-4 ferðir so nógv lesandi kunnu lesa í Stórabretlandi fyri somu upphædd, sum vit hava nýtt til hetta endamál.

Nei, her er ikki bara snakkað! Her er arbeitt! Nú ræður um at halda fram á somu leið! Nógv er eftir at gera!

**Jógvan á Lakjuni,**
landsstýrismaður og valevni Fólkafloksins

www.folkaflokkurin.fo